UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **1. mai 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-142**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-121/2020 eftir Tingskipanini §52 a frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, um fyriskipanir á hægri útbúgvingum til lesandi við serligum avbjóðingum, settur landsstýrismanninum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørji átøk eru sett í verk fyri at hjálpa og stuðla lesandi á hægri lestri, sum hava serligar avbjóðingar, eitt nú orðblindni, tunghoyrn, ADHD, autismu o.a.?
2. Hvørjar førleikar hava verandi lestrarvegleiðarar á hægri lestri at hjálpa og vegleiða lesandi við serligum avbjóðingum?
3. Er nøkur ætlan um útbúgva vegleiðarar at vegleiða og stuðla lesandi við serligum avbjóðingum á hægri lestri?
4. Er nøkur meting gjørd av, hvat tað hevði kostað landinum at sett í verk líknandi skipanir við SPS-vegleiðarum, eins og í Danmark?

Svar

Til 1: Á Fróðskaparsetri Føroya, Vinnuháskúlanum og á Glasi, eru átøk sett í verk, sum stuðla lesandi við serligum avbjóðingum. Felags fyri allar stovnarnar er, at lesandi við niðursettum virkisføri hava møguleika fyri longdari tíð til skrivligar prótøkur, og longdari fyrireikingartíð til munnligar prótøkur. Eisini er felags, at lesandi, sum eru lesiveik, skriviveik ella orðblind, hava atgongd til forritið CD-ORD. Lesandi við serligum avbjóðingum á Vinnuháskúlanum og á Glasi hava haraftrat møguleika at søkja um atgongd til bókagrunnin Nota.

Fróðskaparsetur Føroya er farið undir eina royndarverkætlan við uttanhýsis serfrøði, sum skal stuðla lesandi, sum eru lesi- ella skriviveik, umframt lesandi, sum hava orðblindni. Talan er fyribils um eina eitt ára royndarverkætlan, sum er galdandi frá 1. mai 2021.

Lestrarvegleiðing er á hvørjari deild á Setrinum, har vegleitt verður eftir tørvi. Setrið hevur tríggjar lestrarvegleiðarar í starvi í løtuni, men umhugsar at seta fleiri lestrarvegleiðarar, orsakað av øktum tørvi á vegleiðing.

Setrið hevur greiðar mannagongdir fyri lesandi við niðursettum virkisføri, sum skulu tryggja øllum lesandi á Fróðskapsetri Føroya somu lestrarmøguleikar. Reglurnar áseta møguleikar v.v. stuðulstænastum, sum verða veittar við útgangsstøði í tørvinum hjá tí einstaka.

Síðan 2016 hevur Setrið havt ein teig í umsóknarbløðunum, sum umsøkjarar á Setrinum kunnu útfylla, um tey hava serligan tørv, sum ávirkar teirra virkisføri. Tað verður tilmælt umsøkjarum, sum hava serligan tørv, um at útfylla henda teigin, hóast hetta ikki er eitt krav. Í upptøkutilgongdini fær umsøkjarin bjóðað samrøðu við lestrarvegleiðara um teir einstøku tørvirnir, sum viðkomandi hevur. Hetta verður gjørt fyri betri at lofta tørvinum, so tann lesandi kann lesa á jøvnum føti við øðrum.

Í 2021 hevur Vinnuháskúlin sett ein útbúgvingarvegleiðara, sum samskipar eitt útgreiningararbeiði av teimum lesandi, har tey verða kannaði fyri serligar avbjóðingar í mun til virkisføri. Vegleiðarin samskipar útgreiningina við uttanhýsis serfrøði, sum stendur fyri sjálvari útgreiningini av teimum lesandi. Útgreinanin kann geva rætt til stuðulsamboð til lesing og prógvtøku eftir serligari fyriskipan.

Glasir hevur fastar mannagongdir fyri, hvussu lesandi við niðursettum virkisføri vera loftað, har miðað verður móti at lofta lesandi við serligum avbjóðingum so skjótt sum gjørligt.

Á Næmingatænastuni eru tilknýttir lestrarvegleiðarar, sálarfrøðingar og orðblindalærarar, sum vegleiða og stuðla lesandi við teirra lestri.

Í samstarvi við Hoyrnina og einum donskum veitara, er ymisk tøknilig útgerð fingin til vegar, sum stuðlar tunghoyrdum. Henda útgerðin kann nýtast í bæði undirvísingarhøpi, men eisini til felagstiltøk. Glasir samstarvar eisini við Teknmálstulkatænastuna, sum veitir lærubøkur, undirvísingartilfar og tulk, og sum inngongur í dagliga undirvísing og prógvtøkur.

Leggjast skal afturat, at øll ung í aldrinum 15 til 35 hava rætt til ókeypis sálarhjálp. Hetta fevnir um ein stóran part av teimum lesandi, sum eru undir hægri útbúgving á Glasi, Vinnuháskúlanum ella Fróðskaparsetri Føroya.

Til 2: Lestrarvegleiðararnir á Fróðskaparsetri Føroya hava allir førleikagevandi útbúgvingar til lestrarvegleiðing, og hava vikuligan toymisfund og árligt internat, har fakligir spurningar og tema verða viðgjørd.

Skúlavegleiðarin á Vinnuháskúlanum er ikki útbúgvin lestrarvegleiðari ella orðblindalærari, men er settur til at samskipa økið, við at inndraga uttanhýsis serfrøði. Vegleiðarin á Vinnuháskúlanum er í einari tilgongd, har hann verður førleikamentur umvegis skeið, fyrilestrar, v.m. og er partur av einum netverki við lestrarvegleiðarum á miðnámsskúlunum í Føroyum.

Lestrarvegleiðararnir á Glasi hava útbúgving innan vegleiðing. Partur av starvinum hjá vegleiðarunum er at luttaka á skeiðum, sum vegleiðararnir regluliga luttaka á, fyri at kunna veita teimum lesandi tann stuðul, sum tey hava tørv á. Lestrarvegleiðingin samstarvar eisini við aðrar partar, sum liggja uttanfyri skúlan. Hetta eru fakbólkar og feløg, sum hava við tann ítøkiliga tørvin at gera, og sum eru serfrøðingar á økinum.

Til 3: Í løtuni fyriliggur ongin yvirskipað ætlan um at útbúgva vegleiðarar til lesandi við serligum avbjóðingum, sum eru undir hægri lestri.

Tó hevur lestrarvegleiðaratoymið á Fróðskaparsetri Føroya umrøtt ynski um víðari førleikamenning av lestrarvegleiðarum á øllum hægri lærustovnum, sum er rættað lesandi við meira álvarsomum sálarheilsuligum diagnosum.

Til 4: Ongin kostnaðarmeting er gjørd v.v. íverksetan av einari SPS-vegleiðaraskipan ella líknandi.

Vinarliga

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Jenis av Rana
landsstýrismaður